# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Ford Transit:

# »International Van of the Year 2007«




Í sambandi við at Ford Transit er kosin ”International Van of the Year 2007”, gera Ford í Evropa nógv gjørt burtur hesum heiðuri.

Á grundøkinum hjá “Fords Dunton Technical Centre”, nærhendis London, hava teir sett upp eitt 15 metrar høgt heiðurstekin við ein byggipall, har tríggir ”fullvaksnir” Transit vørubilar eru lyftir upp á byggipallin.

Endamálið hjá Ford Europe við hesum átaki er at marknaðarføra Ford Transit sum ársins vørubil 2007.

**mg**

*Stóri byggipallurin við trimum Ford Transit vørubilum hjá “Fords Dunton Technical Centre”, nærhendis London*



*Toyota eftir støðd. Fremst (frá høgru) Toyota Auris, Toyota Yaris og Toyota Aygo. Bilarnir eru á veg til Suðuroyar og skulu við Smyrli*

# Toyota eftir støðd

Seinasta hósdag stóðu hesir tríggir Toyota bilarnir á rað á Eystaru bryggju í Havn.

Tað áhugaverda við hesi myndini er at bilarnir – helst ótilvitað – standa á rað eftir støðd. Fremst er Toyota Auris (avloysarin fyri Corolla), síðan kemur Yaris og Aygo.

Síðan Toyota Corolla kom til Evropa fyri 40 árum síðan, sum tann minsti Toyota um okkara leiðir, er hann alla tíðina vaksin nakað, so hvørt sum nýggj modell koma á marknaðin. Nýggi Yaris er eisini størri enn forgangarin.

Tendensurin hjá flestu bilmodellum er at so hvørt sum nýggj modell koma, eru tey eitt sindur størri enn forgangarin. Einaferð verður Toyota Aygo kanska líka stórur sum Yaris, og Yaris verður líka stórur sum Auris er í dag. Longdin á hesum trimum bilum er: Auris 4,22 m, Yaris 3,75 m og Aygo 3,41 m.

**mg**

# Svenskur Cadillac Wagon

**Cadillac eru ikki longur einans stórir amerikanskir ”flótarar”, men nú verða teir eisini gjørdir í Skandinavia til evropeiska marknaðin. Cadillac BLS verða gjørdir á Saab verksmiðjuni í Svøríki**

**BILAR**

Cadillac BLS, sum í nøkur ár hevur verið gjørdur á Saab verksmiðjuni í Trollhättan í Svøríki, kemur nú sum stationcar, ið eisini er bygdur yvir Saab 9-3 plattformin eins og sedan útgávan.

Umframt 4 syl. motorar frá 175 til 210 hk, fæst Cadillac BLS við V6 motori við 255 hk. BLS fæst eisini við 1.9 litra dieselmotori við 150 hk.

Tað eru General Motors sum eiga Saab.

**mg**

